

# Leys størv á Teknisku deild

## Starvsfólk til digitala kortviðgerð

Á Teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum fólki til at arbeiða við digitalari kortgerð í sambandi við skráseting av leiðingum v.m. at byrja skjótast til ber.

**Starvið**

Starvið fevnir um uppsetan og røkt av telduskipanini hjá kommununi, herundir eisini skráseting av m.a kloakk-, vatn- og gøtuljósleiðingum.

**Førleikakrøv**

Kommunan sóknast eftir umsøkjara, ið hevur útbúgving sum byggifrøðingur, telduatstøðingur ella umsøkjara, ið hevur samsvarandi útbúgving ella royndir innan digitala kortgerð, er fyrikomandi og nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Alt skrásetingararbeiðið hjá kommununi verður gjørt við Microstation, og er tað umráðandi, at tú hevur kunnleika til hesi forrit og annars dugir at samskifta á føroyskum máli. Harumframt er tað ein fyrimunur, at tú hevur kunnleika til forritini í Microsoft Office pakkanum.

**Vit kunnu bjóða**

eitt áhugavert og spennandi starv, har tú hevur møguleika at menna teg innan kortgerð og annars GIS-supportering sum heild.

## Verkfrøðingur

Í Tórshavnar kommunu eru ætlanir frammi um at fara undir mong áhugaverd anleggsarbeiði, og tískil søkja vit eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið hevur áhuga fyri slíkum verkætlanum.

**Arbeiðsuppgávurnar**

eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við veg-arbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirliti og byggiroknskapi í teimum veg- og anleggsarbeiðum, sum kommunan stendur fyri.

**Útbúgving**

Tann, ið settur verður í starvið, skal hava útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur ella aðra samsvarandi útbúgving, hava góð samstarvsevni, duga at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini í Microsoft Officepakkanum og Navision Attain. Neyðugt er at hava koyrikort.

## Byggifrøðingur

Tórshavnar kommuna stendur í løtuni fyri nógvum áhugaverdum verkætlanum og anleggs-arbeiðum, og tískil søkja vit eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við starvsfeløgum og ráðgevandi vinnuni hevur hug og dirvi at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Arbeiðsuppgávurnar**

eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við vegarbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirlit og byggirokniskapi, sum kommunan stendur fyri.

**Vit ynskja**

at tú hevur útbúgving sum byggifrøðingur ella líknandi og hevur góðar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðugan førleika at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini, ið hoyra til Microstation, Microsoft Officepakkan og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Vit kunnu bjóða**

eitt spennandi og mennandi starv við mongum og fjølbroyttum avbjóðingum innan bygging sum heild, eins og tú fært hollan kunnleika til arbeiðið í eini almennari fyrisiting.

## Persónligir eginleikar

Vit ynskja, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tað er umráðandi at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at málbera teg í skrift og talu.

## Setanarviðurskifti

Størvini verða sett skjótast til ber og verða sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

## Nærri fæst at vita

um størvini við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella til Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra á telefon 30 20 10.

## Umsóknir

saman við viðmælum, avriti av prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. desember 2007 kl. 15.00.

**Tórshavnar kommuna**